# Talið varliga!

Lag: Peter Skjøtt í Ungdomsalder.

Frættu tit, hvat Rasmus segði
í august í Tinginum?
Har hann hjartað opið legði
fyri almenninginum. –
Talan var um danskan dramm,
harðliga fór Rasmus fram:

„DOM og Rom og gott Genever,
Whisky, Sherry, Cognac vieux
slíkt er gott, um tú tað hevur,
ynsk tær ikki betri løg.
Men alt danskt, ja Aalborg reyð,
er tann rami, vísi deyð!“

Mangt, ja, mangt má maður tola,
men nú blóð at skøllum dreiv!
Undrist ei at slík ein skola
friðarmenn av pøllum reiv.
Sjálvur Andrass kundi tá
ikki kvirrur lýða á.

„Nú er vandi her á landi!“
Andrass tók til orða hvast. –
„Nú vil Rasmus slíta bandið,
sum oss bant til Danmark fast.
Rekur hann alt danskt á gátt,
tá skal mangur liggja vátt!“

Signað verði mussaskøðið!
Andrass hann var heppin har.
Ivaleyst í jarðarfrøði
har tann kønasti hann var,
vágið er at slíta bond,
tey sum binda saman lond.

Les bert, hvat teir vísu prógva
síðst nú um Ameriku.
Hon ein dag, tá væl var sjógvað,
reiv seg leys úr Afriku.
Rak so fyri vind og vág,
burturgloymd í øldir lá.

Slíkt kann ganga væl í neyðsfall,
sum av Ameriku sæst.
Hon rak burt í mysing vestfall,
setti kyrrindini fast.
– Føroyar fingu onnur kor,
har fer mangt og margt í sor.

Føroyar eiga meldurstreymin,
streingir, íður, boðabrot.
Um nú Rasmus kvetti teymin,
slepti øllum út á flot,
so at oyggj um aðra vóð,
mangur maður bleikur stóð.

Um nú fjáltur kom á Koltur,
vildi síggja víðu verð,
smurdi seg í lírasmoltur,
fór so smeðið út á ferð,
metti seg við Guinea!
Tað var bert at grinið at.

Men, um Svínoy kleimdi trýnið
millum Klakk og Góðahop,
Streymoy lá við vatn' á síðuni,
Skælingur fekk tarmalop. –
Mundi sjálvur Fugloy tá
vita nøkur heilsuráð?

Bispur fer at lyfta pleyrin
við tað minsta eystangul,
Kellingin fær spark í steyrin –
tonk so uttan undirbul!
Men so fáa vit uppspurt,
um hon nýtir undirskjúrt.

Trøllkonufingur lætt at skilja,
tekur av Hesti skógvarnar,
kitlar hann so undir iljar
á teir beru hógvarnar.
Sigur kátur: „Diggu digg!"
so at Hestur fer um rygg.

Trøllhøvdi fær vatn í grúkin,
reikar ørur pá haloy,
stútar Munkin beint í búkin,
so hann svør um pínadoy,
fær sín sálarfrið so spilt –
Rasmus, er tað tað tú vilt?!